# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar

10. mai fingu Annika Østerø og Heðin Weihe, Keypmannahavn, eina fitta diddu, hon vigaði 2915 gram og var 50 cm long.

25. mai fingu Anja og Jóan Pauli Weihe, Sørvági, eina dóttur. Hon var 37 cm long og vigaði 1250 gr.

23. juni fingu Velika og Velko Gjorgieski, Leirvík, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4000 gr. Hann eitur Daniel Magnus.

24. juni fingu Meiken og Jógvan Suni Michaelsen, Kunoy, eina dóttur.Hon vigaði 4900 gr og var 53 cm long.

28. juni fingu Margith E. Petersen og Mikkel N. B. Hansen, Keypmannahavn, tvíburðar, dreingir. Tobias vigaði 2758 gr og var 48 cm langur, Emil vigaði 3008 gr og var 51 cm langur.

29. juni fingu Susana Mojica de Durhus og Jón Durhuus, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3550 gr.

30. juni fingu Linda og Asle Slapø Båtsfjørd eina dóttur, sum vigaði 2.320 gr og var 47 cm long.

30. juni fingu Sigrid J. Dalsgaard og Heri Joensen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3850 gr.

30. juni fingu Beinta Tórolvsdóttir og Torkil Justinussen, Leirvík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3650 gr.

1. juli fingu Rita Samuelsen, Fuglafirði, og Jan Andreasen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3450 gr.

1. juli fingu Randi Poulsen og Sigurd Hentze, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3100 gr.

3. juli fingu Marjun Jensen og Dan Vestergaard, Vági, eina dóttur. Hon var 53 cm langur og vigaði 3850 gr.

4. juli fingu Vónbjørt Nybo og Alf Hansen, Hósvík, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4650 gr.

4. juli fingu Hertha S. M. Johannesen og Leif Danielsen, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3650 gr.

4. juli fingu Marjun og Sigurð Jacobsen, Klaksvík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3900 gr.

5. juli fingu Rannvá Sólheim og Egon Joensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3300 gr.

6. juli fingu Andrea Debes, Oyri, og Hans Andreas N. Dahl, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4050 gr.

6. juli fingu Anna og Jógvan P. Christiansen, Skála, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3800 gr.

## Prógv

Jóhanna á Tjaldrafløtti, Klaksvík, hevur tann 24. juni lokið prógv sum Klinisk Diætist á JCVU Ernæring og Sundhed í Århus

Bergliot Ihlen, Tórshavn hevur á Århus Universiteti lokið prógv sum Master í heilsuantropologi, MSA.

Mimi Steintórsdóttir úr Fuglafirði, hevur tann 27. juni 2005 lokið prógv innan løgfrøði á Københavns Universiteti.

# Seinasti dagur á góðum arbeiðsplássi



*Rigmor Olsson saman við familjuni til móttøkuna: Aftast vinstrumegin Rigmor Olsson (64 ár), maðurin Moody Olsson (76), sonurin Odmar Olsson (46), sonurin Erling Olsson (41), og ommubørnini Sigmund (14) og Tróndur (17). Fremst vinstrumegin: Kristian (10), Sanna (10) og tvíburarnir Maria og Marta (8) og fremst Annika (6). Á myndini vantar Pætur.*

Fríggjadagin 24. juni hevði 64 ára gamla Rigmor Olsson í Havn sín seinasta starvsdag á pleygudeildini E2.

Hetta vildu hvørki leiðsla ella starvsfelagar lata um seg fara, og tí skipaðu tey fyri eini lítlari resepsjón í hesum sambandi.

Rigmor varð útlærd sum sjúkrahjálpari í 1965, og byrjaði í 1966 á pleygudeildini, har hon hevur verið hesi seinastu 39 árini.

- Hetta hevur verið eitt gott arbeiðspláss. Tí hevur man verið her alla tíðina, sigur Rigmor Olsson.

**sb.**



*Starvsfelagar og onnur vildu eisini fegin heiðra Rigmor henda dagin: Vinstrumegin: Herborg Dølum, Hildegarð Mouritsen, Meiken Joensen, Sedea Poulsen, Johanna Køtlum, Joan Køtlum og Ulla Joensen*

# Tvær konsertir við Magna

Kendi føroyski countrysangarin Magni Christiansen fer í næstum at hava tvær konsertir.

Fyrra konsertin verður sunnudagin kl. 20 í Mentanarhúsinum í Fuglafirði og tann seinna í ítróttarhøllini í Vestmanna 24. juli.

Hesar báðar konsertirnar kunnu síggjast sum ein partur av fyrireikingini til spennandi ferð hansara til Nashville í USA í august, tá ætlanin er at taka upp eina nýggja fløgu.

**sb.**



*Magni hevur tvær konsertir henda mánaðin – tann fyrra longu í annaðkvøld*